# Ríma

Tað komu tveir biðlar í ein bil.
– Biðið tygur renna –
 Har var standur og ringt skil.
– Rúnarmenn, gerið tað mín jomfrú,
eg biði tygur: rennið, talið varliga við teir,
rúnarmenn!

2. Annar svór so dýran við.
Tikið mína undan lið.

3. Hin hann snúði sær á so brátt.
Hann gav honum eyga blátt.

4. Blóðið rann av enni.
Teir skeittu yvir at henni.

5. Løgreglan kom har uppí.
Báðir fingu snoldrað síð.

6. Teir fóru fyri Føroya Rætt.
So havi eg tey tíðindi frætt.

7. Rætturin hann segði tað:
sita frá jólum til trettanda dag.

Meðan hvørgin var til staða,
fekk gentan sær ein triðja.

Ríman stendur í yrkingarsavninum: "Ástarglæman" frá 1982, eftir Sámal Hansen (1928-1986) úr Funningsfirði. Sámal búði rættiliga nógv í Funningi, tá ið hann var blivin vaksin og bleiv tí kallaður Sámal í Funningsfirði.